# Nýggj Kawasaki ZX-10R

MC
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Motorjournalistar frá motorsúkklubløðum í Evropa hava royndarkoyrt nýggjastu Kawasakis ZX-10R við sera góðum úrsliti. Í seks dagar royndarkoyrdu tilsamans 85 motorjournalistar frá motorsúkklubløðum í øllum Evropa súkkluna,og fekk hon góð skotsmál sum ein tann kvikasta og best koyrandi sportsúkklan í sínum klassa.

Kawasaki ZX-10R hevur 4 syl. vatnkøldan 998 ccm raðmotor við 188 hk við 12.500 snún/min.

Súkklan hevur 6-gir og eina sera framkomna motorstýring, sum Kawasaki kalla KIMS (Kawasaki Ignition Management System), sum altíð gevur optimala kraft saman við minst møguliga útlátinum.

Kawasaki ZX-10R hevur aluminium chassis, sum er gjørt í samstarvi við professionellar rasarakoyrarar. Hetta er við til at gera súkkluna lætta at umgansast og at koyra.

Súkklan kemur á marknaðin síðst í februar.

Kawasaki ZX-10R kostar kr. 156.845. Tað er MC-Sølan á Norðasta Horni í Havn sum umboðar Kawasaki motorsúkklurnar. Heimasíða: www.mc-solan.fo



*Kawasaki ZX-10R er gjørd í samstarvi við professionellar rasarakoyrarar*







# Ferrari sum stationcar



Gott pláss í viðførisrúminum er ikki tað sum Ferrari eru kendir fyri. Men nú er ein »stationcar« útgáva av Ferrari á veg við góðum plássi í viðførisrúminum.

Talan er um ein Ferrari, sum verður gjørdur hjá hálendsku designfyritøkuni Vandenbrink Design.

Útgangsstøðið er nýggi Ferrari 612 Scaglietti, sum teir hava navngivið Shooting Brake.

Motorurin er ein 6,3 litra V12 við 739 hk.

Endaligi prísurin er ikki ásettur enn, men roknað verður við, at hann í Danmark kemur at kosta umleið fimm milliónir uttan avgjøld.





# Heimsins fyrsti boxerdiesel

Subaru eru nú til reiðar við heimsins fyrsta boxer dieselmotori, sum verður sýndur fram á altjóða bilaframsýningini »Biler i Bella« í Keypmannahavn síðst í mars.

Japanska Subaru verksmiðjan vil vera við, at nýggi boxer dieselmotorurin larmar sera lítið og er uttan tær ristingar, sum kunnu merkjast í boxer bensinmotorunum.

Talan er um ein kvikan og økonomiskan 2,0 litra motor við 150 hk og snúningsmomenti upp á 350 Nm og koyrir frá 0-100 km/t upp á 8,7 sekund. Oljunýtslan er 17,9 km/l við blandaðari koyring.

Fyrstu bilarnir sum fáa hendan motorin boxer dieselmotorurin eru Subaru Legacy og Legacy Outback.